## Eitt kuffert burtur

Tá somikið nógv viðføri skal flytast av vøllinum í Vágum og til Serbia, so er sjálvandi altíð vandi fyri, at onkur taska ikki kemur allan vegin. Og soleiðis var eisini Beograd í gjárkvøldið. Tá kuffertini vórðu tald upp, restaði eitt, og so var at finna útav, hvat skuldi verið í hesum. Tað vísti seg, at talan er um nøkur av venjingarklæðunum, sum landsliðið skal brúka á ferðini, men helst er ferðalagið somikið væl fyri á hesum økinum, at eingin spælari verður settur uttan fyri kortini. Á myndini sæst Bárður Olsen, sum er ein av liðleiðarunum, í ferð við at savna merkiseðlarnir inn, so fráboðanin um vantandi kuffertið kann gevast.



## Hitin verður nógvur

Umframt hørðu mótstøðuna, so verður hitin í Beograd helst eisini ein harður fíggindi hjá føroyska landsliðnum. Leygardagin verður roknað við, at hitin fer upp um tey 35 stigini, og hóast sólin hevur sett, tá føroyska landsliðið fer á vøllin, so verða tað væntandi eini 27-28 hitastig um hetta mundið. Og tað er ikki júst tað, sum føroyskir fótbóltsspælarar eru vanir við.

# Nýggjur landsliðsvenjari

**Casper Løje Pedersen eitur nýggi landsliðsvenjari í borðtennis. Hann er 27 ára gamal og kemur av Lollandi í Danmark**



*Andrass Nolsøe og Casper Løje Pedersen skriva her undir pappírini, sum bindur partarnar til og við oyggjaleikirnar á Álandi í 2009*

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umframt at hava verið høvuðsvenjari í Maribo í mong ár, so hevur Casper Løje Pedersen eisini verið venjari í Køge BTK sum er eitt av størstu borðtennisfeløgunum á Sjællandi.

Seinnu árini hevur hann eisini sitið í serstakari talent-nevnd hjá Dansk Bordtennis Union.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at samstarvið við nýggja venjaran kom í lagi, tá Borðtennissambandið var við í Norðurlendsku meistarakappinini í Maribo fyrr í ár. Ein kapping, sum Casper eisini var við til at skipa fyri.

Týskvøldið skrivaðu Andras Nolsøe, vegna Borðtennissamband Føroya og Casper løje Pedesen so undir ein eitt ára sáttmála, sum er galdandi fram til oyggjaleikirnir hava verið í Álandi í 2009. Casper kemur at venja føroysku a-landsliðini hjá kvinnum og monnum umframt ungdómslandsliðini.

Harafturat kemur Casper at venja TBF tvær ferðir um vikuna, og Royn og TÓR eina ferð um vikuna.

## Tríggir dystir í bólki sjey

Umframt landsdystin hjá Føroyum leygardagin, so verða tveir aðrir dystir eisini spældir í bólki 7, har Føroyar er eitt av liðunum.

Á Lia Manoili í Bukarest spæla Rumenia og Litava, og í Ernst Happel-leikvøllinum í Wien tekur Eysturríki ímóti Fraklandi.

Og mikukvøldið eru aftur tríggir dystir á skránni. Tá vitjar Rumenia á Tórsvølli í Havn. Frakland hevur tá heimavøll á Stade de France móti Serbia, og á Zalgiris Stadium tekur Litava ímóti Eysturríki.

**-mørk**

## Brúka ikki Bojan

Serbiski venjarin, Radomir Antic, hevur sagt, at hann vil ikki taka serbiska stórtalentið í Barcelona, Bojan Krkic, við í hópin.

Bojan hevurspanska mammu og serbiskan pápa, og tí kann hann velja, hvørjum landsliði hann spælir á. Hann var eisini í spanska hópinum til seinastu úttøkuna, men fríggjadagin varð ann kortini sáldaður frá. Men spanski landsliðsvenjarin heldur tó fast um, at spælarin í framtíðini skal spæla á spanska landsliðnum.

- Tað hevði verið fantastiskt, um hann valdi at spæla fyri Serbia. Eg havi einki ímóti spanska landsliðnum, og eg ætli mær ikki at skapa nakrar trupulleikar við at taka Bojan í okkara hóp, sigur Antic, sum sigst vera sera væl við pápa Bojan. Hesin eitur eisini Bojan Krkic, og spældi í síni tíð við Reyðu Stjørnu.

**-mørk**



*Soleiðis kemur nýggja Støkk-høllin at síggja út. Sáttmálin um byggingina verður undirskrivaður leygardagin*

# Rimmar Støkkdagur

Leygardagin verður endaliga avtalan um bygging av nýggjari Støkkhøll undirskrivað. Tí skipar fimleikafelagið Støkk fyri rimmar Støkkdegi í ítróttarhøllini í Runavík. Tiltakið er alment, og Støkk vónar at síggja nógv fólk hendan dagin.

Dagurin byrjar klokkan 13, tá børnini sleppa at gera fimleik og spæla. Í meðan kunnu foreldrini hugna sær við kaffi og køkum. Á skránni verður millum annaðkøkutombola, fiskibrunnur og kapping um at gita, hvussu nógvar Silvabússur eru í einum kassa. Apexferðaseðlar kunnu vinnast og lutaseðlasøla uppá ein bil, av slagnum Kia Ceed 1,4, byrjar hendan dagin.

Møguleiki verður at lata pening til nýggju Støkkhøllina. Nøvnini á øllum, sum lata pening til nýggju høllina, verða sett á eina soylu, sum kemur at standa í nýggju Støkkhøllini.

Klokkan 15 verður endaligi byggisáttmálin millum TN-Bygging og Støkk undirskrivaður.